## Onga undirtøku

Teir tríggir flokkarnir í landsstýrissamgonguni fara ikki at taka undir við uppskotinum hjá tveimum tjóðveldistingmonnum og Miðflokkinum um at lækka valrættaraldurin úr 18 í 16 ár. Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin eru á einum máli um, at tað ber ikki til at geva ungfólki valrætt og valbæri, áðrenn tey eru myndug. Aldurin at velja og myndugleikaaldurin mugu fylgjast, halda teir tríggir samgonguflokkarnir.

## Byggja egningarskúrar

Kommunurnar í Hvannasundi og á Viðareiði umhugsa at byggja egningarskúrar í Hvannasundi. Fyrradagin skipaðu tær fyri einum kunnandi fundi um ætlanina fyri at vita, hvussu áhugin er millum útróðrarmenn. Kári Kallsberg, varaborgarstjóri á Viðareiði, sigur við Dimmalætting, at útróðrarmenninir vístu áhuga fyri at keypa skúrarnar, verða teir bygdir, men enn hava tær báðar kommunurnar ikki tikið endaliga støðu.

# 50 sløg av Teiti



*– Hvørja ferð eitt lag verður spælt við Teiti, so verður altíð sagt at tað er "Teitur Lassen fra Færøerne". Soleiðis verður tað gjørt vart við Føroyar. Fólk fáa eina positiva uppliving av at hoyra sangir hansara, og soleiðis eisini eina positiva mynd av Føroyum. Men Teitur er bara ein. Høvdu tit havt 50 ymisk sløg av Teitur, so hevði tað verið eitt megnar lop víðari, heldur Søren Ejlersen*

*Mynd: Høgni Thomsen*

so eitt sindur um Føroyar. Tað er ein máti at gera tað uppá, og soleiðis fer altíð eitt sindur av søgu og upplýsingum út um Føroyar, tá fiskur verður útfluttur, greiðir Søren Ejlersen frá, og nevnir síðani Teit sum dømi um eitt gott føroyskt brand.

– Hvørja ferð eitt lag verður spælt við Teiti, so verður altíð sagt at tað er "Teitur Lassen fra Færøerne". Soleiðis verður tað gjørt vart við Føroyar. Fólk fáa eina positiva uppliving av at hoyra sangir hansara, og soleiðis eisini eina positiva mynd av Føroyum. Men Teitur er bara ein. Høvdu tit havt 50 ymisk sløg av Teitur, so hevði tað verið eitt megnar lop víðari, heldur Søren Ejlersen.

Hann fer síðani víðari í prátinum um branding av Føroyum.

– Føroyar eru eitt reint og í mangar mátar óspilt land. Her er bara reint, vatn allastaðni og bara natúra. Føroyar eru fantastiska langt vekk frá øllum, men Føroyar eru fantastiskar, og tað skal lýsast fyri øðrum, sigur Søren Ejlersen.

**Vandin skapar spenning**

Mánakvøldið greiddi hann teimum uppmøttu í Atlantis frá um sítt virksemi. Í dag er hann farin aftur til Danmarkar. Nakrar positivar upplivingar ríkari.

– Eg var bilsin av, at so nógv møttu upp. Eisini var tað stuttligt at eygleiða Rana, tí hann hevði ongan møguleika at vita, um fimm fólk fóru at møta til tiltakið, ella um tað komu hundrað. Men so komu væl omanfyri hundrað, og so veit Rani at hann hevur fatur í rætta endanum, vísir Søren Ejlersen á.

Júst hatta við ikki at vita, júst hvar tú ert, er ein stórur partur í íverksetaravirkseminum.

– Tað er í risikofeltinum har tað er spennandi at vera. Men tað er skjótt frá succés til katastrofu. Framhaldandi succés er treytað av, at høga ferðin verður hildin, at smíða verður meðan jarnið er heitt og at røttu avgerðirnar verða tiknar, sigur Søren Ejlersen.

**Stórir møguleikar við húsinum**

Hann sær eisini stórar møguleikar í Íverksetarahúsinum í Klaksvík.

– Hetta er ein góð verkætlan. Hetta verður gjørt alla aðrastaðni við. Fyri at gera vart við seg og fyri ikki at verða yvirhálað á globala marknaðinum, sigur hann.

– Tað er stórur møguleiki fyri, at fólk um nøkur ár hyggja at hesum húsinum (Íverksetarahúsinum, blðm.) við stórari virðing, men tað er treytað av stuðli alla staðni frá endar Søren Ejlersen.

## Stutt um virksemið hjá Søren

Søren Ejlersen er 39 ára gamal, upprunaliga útbúgvin kokkur men hevur seinastu sjey árini tikist við annað enn matstovuvirksemi.

Í 1999 byrjaði hann saman Thomas Harttung alnetshandilin Aastiderne.com. Aarstiderne er alnetshandil burturav. Á heimasíðuni ber til at bíleggja frukt, grønmeti, fisk ella hvat tað skal vera, og síðani fáa tað borið til dyrnar.Hetta er ein handil, sum umvegis alnetið selur vistfrøðiligt grønmeti og frukt.

– Handilin er bygdur á ein lívsdreym um at handla við matvørum við høgari góðsku, sigur Søren Ejlersen um virksemi.

At danir hava tikið handilin og ikki minst vøruna til sín, er økta virksemi hjá fyritøkuni eitt greitt prógv um. 1999 vóru tey seks sum starvaðust í Aarstiderne, og í dag hevur fyritøkan omanfyri 200 starvsfólk, við nógvum deildum kring Danmark. Fyri ikki so langari tíð síðani læt eisini ein deild hjá Aarstiderne upp í Svøríki.



*Søren Ejlersen, Rani Nolsøe og Jens Ravn uttanfyri Íverksetarahúsið í Klaksvík*

*Mynd: Høgni Thomsen*